# Føroyingar í toppinum

**Eftir fýra umfør av 4th Klaksvík International, eru Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen við í oddastríðnum. Helgi Dam Ziska hevur hinvegin fingið eina tunga kappingarbyrjan**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*


*Saman við Heina Olsen er Hans Kristian Simonsen enn partur av oddastríðnum í stóru talvkappingini í Klaksvík*

Í fornum og stásiligum umhvørvi í "Leikalund" sita seks sterkir telvarar í hesum døgum og stríðast og berjast ímóti hvørjum øðrum við intellekti teirra. Hóast tú situr fyri tað mesta púra friðarligur, er slík talvkapping sera møðandi. Og gongst tær illa, kann tað verða torført at finna neyðuga mentala styrki framaftur.

Eftir tríggir ósigrar á rað, eydnaðist tað Helga D. Ziska í 4. umfari at fáa javnt ímóti Hans Kristiani Simonsen. Helgi tapti óneyðugt í 1. umfari ímóti Eiriki Gullaksen og helst varð hesin hvøkkur orsøkin til telving undir vanligt støði næstu tvey umførini ímóti ávíkavist Heina Olsen og Johan Eriksson. Men við javnleikinum sunnudagin er Helgi komin í gongd. Vónandi eisini mentalt.

## Snarsigur á norskum altjóða meistara

Hans Kristian og Heini hittust í fyrsta umfari. Uppgerðina vann Hans Kristian ruddiliga. Heini hevur tó longu vent gongdini, fyrst við sigri á Helga í 2. umfari og síðani fletti hann Gullaksen sera snøgt og skjótt í 3. umfari. Heini vísti taktiskar snildir sínar í hesum talvi, sum er við í blaðnum.

Sunnudagin leikt klaksvíkingurin ein góðan javnleik við svarta fólkinum ímóti Jens Ova Fries Nielsen og við javnleikinum hevur Heini 2,5 stig eftir fyrstu fýra umførini.

Eins og Hans Kristian skal Heini hava 7 stig av 10 møguligum fyri at vinna sær ein norm. Hetta tykist als ikki ógjørligt fyri teir báðar.

Hans Kristian hevur eisini 2,5 stig. Eftir sigurin á Heina, hevur sterki kollfirðingurin leikt tríggjar javnleikir, har hann ongantíð hevur verið í trupulleikum. Tvørturímóti, tí í talvinum ímóti Eriksson í 2. umfari, hevði Hans Kristian greiðan vinnandi fyrimun, men flutti síðani skeivt og blakaði sigurin vekk.

Orsøk er at fegnast um stigini higartil hjá Heina og Hans Kristiani. Óført at tveir av okkara monnum hava fingið góða byrjan og harvið enn hava møguleikan fyri normum og kappingarsigri. Mánadagin eftir evstamark var oddabrak millum Heina og Eriksson.

**Støðan**

| telvari | rating | stig |
|---|---|---|
| Johan Eriksson | (2423) | 3,0/4 |
| Heini Olsen | (2325) | 2,5 |
| Hans K. Simonsen | (2305) | 2,5 |
| Eirik Gullaksen | (2382) | 2,0 |
| Jens O. F. Nielsen | (2381) | 2,0 |
| Helgi D. Ziska | (2177) | 0,5 |

## Fyrrverandi vinnari á odda

Vinnarin av 2nd Klaksvík International, Johan Eriksson, er á odda við trimum stigum. Hann var sum sagt í trupulleikum ímóti Hans Kristiani, men annars hevur sviin telvað sannførandi. Tvey av talvunum hjá Eriksson hava verið sera drúgv: Eriksson - Gullaksen remis, 105 leikir, og Ziska - Eriksson 0-1, 114 leikir!

Gullaksen og Fries Nielsen hava skuffað við ávíkavist tveimum og hálvumøðrum stigum.

Talvini verða víst beinleiðis á www.faroechess.com. Á www.myndakall.fo eru myndir frá kappingini at síggja.

## Talvið hesa vikuna

**IM Eirik Gullaksen (2382) - Heini Olsen (2325)**
Klaksvik International 2005 (3), 17.09.2005

**1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 a6 4.Ba4 Rif6 5.d3 b5 6.Bb3 Be7 7.Ric3** Gullaksen telvar varligt frábrigdi í sponsku byrjanini **7...d6 8.a3 Be6 9.Bxe6 fxe6 10.0-0 0-0 11.d4 Rixd4 12.Rixd4 exd4 13.Fxd4 Rid7!** Riddarin gevur pláss til bispin, umframt at leikurin opnar fyri rókinum. Riddarin kikar sjálvur eftir e5-puntinum **14.Be3 Bf6 15.Fd2 Rie5** Svartur hevur longu fyrimun **16.b3 Rig4 17.Bd4 Bxd4 18.Fxd4 Fh4! 19.h3 Rie5** Nú má hvítur vera á varðhaldi. Men næsti leikur er katastrofalur 20.Fe3?? f3 ella Rie2 eru bestu møguleikarnir, í einari kortini verri støðu.


Støðumynd eftir 20.Fe3

**20...Rf3!!** snøgt og vinnandi **21.Fe1** Lítið hjálpir: **21.gxf3 Fxh3, sum vinnur 21...Rxh3! 22.gxh3 Rif3+ 23.Kg2 Rixe1+ 24.Raxe1 Fg5+ 25.Kh1 Rf8!** Hvítur gavst í vónleysari støðu. Gullaksen kann t.d. ikki verja h-finnuna, uttan at missa aðrar finnur. **0-1**

# Fótbóltscafé

*Tað var stúgvandi fult á Glitnum, tá reyðu arvafíggindarnir í Onglandi brustu saman sunnudagin*



Í nógv ár hevur verið tosað um, at føroyingar áttu at fingið sær eina veruliga fótboltscafé, soleiðis sum vit kenna tær uttanlands. Fleiri royndir eru eisinin gjørdar higartil, men ein av teimum meira væl eydnaðu, tykist kortini vera nýggja Glitnir í Vágsbotni.

Sunnudagar hava teir vanliga havt upphiting fyri áskoðarar á skránni, soleiðis at hesir kunnu sita í Vágsbotni og mýkja stemmubondini, áðrenn leiðin verður løgd niðan í Gundadal, og enskur fótbóltur hevur sjálvandi eisini verið á skránni.

Soleiðis var eisini sunnudagin, tá arvafíggindarnir Liverpool og Manchester United brustu saman á Anfield Road. Fjepparar í báðum legum høvdu boðað frá, at leiðin nú gekk oman í Glitnir, og tá dysturin varð blástur ígongd á miðdegi, var stúgvandi fult inni í hølunum.

Og tó at talan gjørdist um ein málleysan javnleik, har tað í nógvar mátar var langt millum snapsarnar, so nervaði hetta á ongan hátt hugalaðnum. Stuðulsróp og -klapp vóru støðugt at hoyra - alt eftir hvør gjørdi hvat. Og einki man vera at ivast í, at bæði viðhaldsfólkini hjá Manchester og Liverpool eisini framyvir fara at síggja fleiri góðar dystir við stórskíggjan.

**-mørk**